Leikrit



# Tá jólagávurnar vóru stolnar

Landsmiðstøðin

# Tá jólagávurnar vóru stolnar

Jólaleikur í fýra pørtum

Tey leikandi eru

Frásøgufólk

Vættrapápin

Vættramamman

Klumpur

Humpur

Snáka

Snøka

Trøllapápin

Trøllamamman

Palli

Kalli

Purla

Nalli

# Tá jólagávurnar vóru stolnar

BG95

## I Í vættraholuni

(Vættrabørnini hava skund at pakka jólagávur inn, tí í morgin er jólaaftan, og so skulu tey út við gávum. Vættrapápin gongur runt og vísir teimum, hvussu tey skulu bera seg at. Vættramamman bakar piparnøtur. Kettan situr á einum stóli og hyggur at teimum.)

Klumpur: Hvussu setur ein hjól á ein leikubil?

Vættrapápin: Nú skal eg vísa tær. Hygg, soleiðis skalt tú gera.

Humpur: Verður tað ikki eitt vakurt skip? Hvør skal hava tað?

Vættrapápin: Jú, Óli, sum býr í tí lítla húsinum inni í skógini, hann skal eiga tað.

Snøka: Immmm, her luktar frálíkt. Eg verði so svong eftir piparnøtum.

Vættramamman: Ja, tit kunnu líta á, at eg havið baka nógvar. Komið og smakkið!

(Tey eta piparnøtur, og Snøka slikkar fatið við restini av deigginum.)

Snáka: Álght, tú ert eitt svín.

Snøka: Nei, eg eri ein vættur.

(So dansa tey runt og syngja):

Lag: I en kælder sort som kul

Vættramamman er so fitt,
bakar piparnøtur,
ger so góðan rísingreyt,
tí hann smakkar søtur.
Dansa allir vættrar smá,
dansa runt við tuflum á.
Klappa,klappa, klampa,
hoyr, vit kunnu trampa.

Áðrenn tað kann vera jól,
hava nógv at gera,
jólagávur fáa øll,
eingin skal umvera.
Hey, so er' tað aftur jól,
syng so við títt lítla fjól.
Klappa, klappa, klampa,
hoyr, vit kunnu trampa.

Vættrapápin: Nú skulu allar gávurnar í posan, og so skulu vit í song, tí vit skulu tíðliga upp í morgin.

(So koyra tey allar jólagávurnar í ein posa og stilla hann í eitt horn. Tey leggja seg á gólvið, og skjótt sova tey. Snøka snorkar hart.)

## II Seinri út á náttina

Trøllapápin (kemur sníkjandi inn og hyggur seg um): Hvat munnu tey hava gjørt við jólagávurnar? (Hann fær eyga á posan.) Á, har eru tær. Nú taki eg allan posan við heim til mínar smáu jassar. Tí eg fái ikki frið, fyrr enn teir eisini fáa jólagávur. (Til áskoðararnar:) Tit mugu ikki siga tað fyri vættrunum.

(Trøllapápin tekur posan og skal fara avstað, men kettan hevur sæð hann. Hon mjavvar og fylgir eftir honum.)

Trøllapápin (kústar kettuna burtur): Burtur við tær, ketta - ansa tær sjálvari.

(Trøllapápin skundar sær út við posanum, - - men kettan sníkir seg eftir honum. Nakað seinri vakna vættrarnar, remba sær og geispa.)

Vættrapápin: Hoyrið, nú mugu vit skunda okkum avstað, tí vit hava nógv at gera í kvøld.

Snáka: Ja, men hvar er posin við øllum jólagávunum?

Øll vættrabørnini: Jólagávurnar eru horvnar! Hvør hevur goymt tær?

(Tey leita eftir gávunum allastaðni. Ímeðan kemur kettan inn. Hon loypur yvir til vættrapápan og mjavvar. Hann kústar hana burtur, men kettan blívur við at mjavva.)

Klumpur: Hygg, kettan! Hon vil siga okkum okkurt.

Humpur: Hvat er tað, Kiskan? Veitst tú, hvar jólagávurnar eru? (Kettan mjavvar og nikkar)

Øll vættrabørnini: Kettan veit tað!

Vættrapápin: Kiska góða, so mást tú vísa mær vegin.

(Kettan mjavvar aftur og gongur undan yvir til hurðina. Vættrapápin gongur aftaná.

## III Í trøllaheygnum

(Trøllamamman stendur og rørir í einari stórari grýtu. Nøkur trøllabørn liggja á gólvinum og berjast. Í einum horni situr ein lítil søt trøllagenta við sloyfu í hárinum og spælir við eina dukku.)

Trøllamamman: Latið meg so hoyra, hvørjar ónaðir tit hava gjørt í dag.

Palli: Eg havi skrykt ein íkorna í halan.

Kalli: Eg havi rullað ein stóran stein fyri inngongdina til revaholuna.

Purla: Og eg havi argað gomlu ugluna so hon ikki fekk sovið.

Trøllamamman: Og hvat hevur tú so gjørt, Nalli lítli?

Nalli: Eg havi hjálpt einum tindasvíni yvir um vegin.

Trøllapápin (kemur í somu løtu inn við posanum): Hvat hevur tú gjørt? Hevur tú nú aftur verið fittur? So fært tú ongar jólagávur.

Øll trøllabørnini: Jólagávur! Hevur tú jólagávur við til okkara? Juu-huu!

Trøllapápin (setur posan frá sær): Haldið gák, jassar! Nú kann posin verða standandi her. Eg eri svangur, og eg skal hava okkurt at eta, áðrenn eg lati posan upp.

Trøllamamman: Súpanin er liðug. Komið og setið tykkum, øll somul.

(Tey seta seg við hvør sínari skeið. Trøllapápin slurkar súpanina í seg.)

Trøllabørnini (berjast um at sleppa til borðið): Aaahhh, hetta er ein skrøpp súpan.

(Meðan tey eta, kemur fyrst kettan og síðan vættrapápin sníkjandi inn. Hann sær posan við jólagávunum í, sníkir seg ímóti honum, men dettur tvørtur um eina trærót.)

Trøllapápin: Hvat var hatta? Eg hoyrdi nakað. Palli, far og vita, hvat tað var.

Palli: Nei, illanstíð.

(Hann ger tað hóast alt, men tá hevur vættrapápin goymt seg, so Palli sær hann ikki.

Palli: Har var einki at síggja.

Trøllapápin (slær seg á búkin): Áhh, sum tað er ein góð súpan, tú gert, momman.

Trøllaungarnir: Nú skulu vit hava jólagávurnar.

Trøllapápin: Nei, fyrst skulu vit syngja mín trøllasang. Syngið við, jassar.

Øll syngja:

(Mel: Jeg gik mig over sø og land)

Hygg, pápi er eitt ordans trøll,
tí hann fór upp um høgu fjøll
og aftur kom til vára høll
við vættrajólagávum.
Trøllamamman, hon ger mat,
froskar, sniglar á eitt fat,
so einki trøllabarnið græt,
og mettir gjørdust magar.

(Vættrapápin hevur ímeðan fingið fatur á posanum og er við at sníkja seg út við honum).

Trøllapápin: Nú skulu tit bara síggja, hvat eg havi tikið til tykkara.

Trøllaungarnir: Ju-huu!

Trøllapápin: Hvat í allari víðu verð! Posin er burtur! Onkur hevur tikið hann!

Kalli: Hvør kann tað vera?

Trøllaungarnir: Áh, allar okkara jólagávur!

Nalli: Hugsa tær, at nakar fær seg til at stjala nú beint fyri jól.

# IV Í vættraholuni

(Vættrabørnini sita og eru hørm um støðuna.)

Klumpur: Nú eru tað eingi børn, sum fáa jólagávur í ár.

Humpur: Tað verða eini ræðuliga keðilig jól.

Snøka: Hoyrið. Onkur kemur. Hvør man tað vera? (Kettan kemur inn og vættrapápin aftaná.)

Vættramamman (slær hendurnar saman): Áh, vættrapápi! Hvar fanst tú posan við jólagávunum?

Vættrapápin (setur posan frá sær): Ja, hvar halda tit? - Hjá trøllunum! Tað var kettan, sum visti tað og vísti mær á staðið - ikki satt, Kiskan? (Hann kínir kettuni.)

Vættramamman: Skundið tykkum nú og koyrið sletuna út, tí nú skulu tit út við gávum. Tit klára tað akkurát.

(Allar vættrarnar taka í hondina hvør á øðrum og syngja).

Lag: I en kælder sort som kul

Trøllapápin kom og stjól
ein sekk við nógvum gávum.
Vættrapápin leyp av ból
hjálp frá vættrum smáum.
Fara út so langan tein,
verða kanska alt ov sein.
Snipp og snapp og snúti,
nú er spælið úti.

(Allir lutakararnir og áskoðararnir syngja):

Vættramamma - vættrapápi,
vættragenta - drongur,
vættramatur, vættraborð,
vættrafólkakongur.
Tjúkka vættur - klæna vættur,
stutta vættur - langa vættur,
stjørnurnar tær glampa,
vættrarnar tær trampa.

Reyðar húgvur, hosur gráar
allar vættrar eiga,
renna so um jólatræ
og hvønn annan leiða,
troyggjan reyð og skeggið grátt,
á, sum vætturin er flott,
stjørnurnar tær glampa,
allar vættrar trampa.

Rísingreyt og ræstan fisk,
bomm og stóran pakka
vættrabørn tey ynskja sær,
og tey bara snakka.
Tjúkka vættur - klæna vættur,
stutta vættur - langa vættur,
stjørnurnar tær glampa,
allar vættrar trampa.

(Fólk klappa og allir leikararnir og hjálparfólkið koma inn á pallin. Genturnar níga, og dreingirnir bukka).

Umsett úr donskum hava næmingar í 5. flokki á Adventistaskúlanum í nov. 1995.